# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tørvur á leiðslu

Mánadagin vístu vit á, at tann órógv, ið er á samgonguni, setur stór krøv til samgonguleiðsluna. Tað er einki óvanligt, at samgongulimir, eisini landsstýrisfólk markera seg og eru ósamd. Men alt skal vera við máta. Undir truplum umstøðum er sera óheppið, at klandur millum flokkar og einstakar samgongulimir elvir til atgerðarloysi. Hetta er serstakliga galdandi, um útlit eru til búskaparligar trupulleikar. Tann stóra kreppan var ein stórur skelkur hjá øllum føroyingum. Av hesi orsøk eru fólk sera upptikin av, hvussu ein samgonga og ein samgonguleiðsla takla eitthvørt kreppubtekin, og hetta er væl skiljandi. Tað, ið hendi, má ongantíð henda aftur. Tað kann tí ikki annað enn undra, at samgongufólk nýta so nógva orku til ósemjur og markeringar í staðin fyri at standa saman sum ein maður.

Undir slíkum umstøðum er tað sera umráðandi , at eisini samgonguleiðslan heldur høvdið kalt og sýnir áræði og dirvi. Tað er synd at siga, at hesi hugtøk ganga fram av teimum útmeldingum, ið løgmaður í seinastuni er komin við. Í samrøðu við kappingarneytan er løgmaður opin og erligur. Hann viðgongur, at hóast búskaparligu útlitini versna dag frá degi, hevur samgongan onga strategi til tess at takla støðuna. Tað er alla æru vert, at løgmaður leggur kortini á borðið. Men samstundis er samrøðan so avdúkandi, at hon beinleiðis kann elva til óneyðugan ótta millum manna og í vinnulívinum. Hóast løgmaður roynir at vísa á glottar, kann hetta ikki fjala út yvir myndina av eini samgonguleiðslu, ið stendur at kalla ráðaleys mótvegis teimum búskaparligu trupulleikum, ið eru fyri framman. Tað einasta ítøkiliga er endurtøkan um, at tað almenna ikki fer inn við stuðuli til fiskivinnuna. Tað er skiljandi, tí tað er eingin, ið vil hava studningsbúskapin aftur. Hinvegin eigur hetta ikki at forða landsstýrinum í at hava ein vinnu- og búskaparpolitikk, ið hevur til endamáls at byrgja fyri búskaparkreppu. Rætt skal tó vera rætt. Nógv bendir á, at landstýrið hevur skilagóðar ætlanir, ið sum frálíður skulu bøta um trupulleikarnar hjá fiskivinnuni. Hinvegin sær tað út, sum landsstýrið eingi ráð veit til tess at takla aktuellu trupulleikarnar. Henda støðan krevur eina leiðslu, ið megnar at halda samgonguni saman og fáa landsstýrisfólkini til verka til tess at loysa aktuellu trupulleikarnar eins væl og skapa eina strategi fyri ein haldgóðan og burðardyggan vinnu- og búskaparpolitikk í framtíðini. Tað er sostatt ikki tørvur á uppgávulyndi, ráðaloysi og atgerðarloysi, men heldur er tørvur á áræði, ráðatøkni og virkisfýsni. Tað er tørvur á leiðslu í Tinganesi, og tað er ikki ov seint hjá løgmanni í verki at vísa, at hann megnar hesa uppgávu. Hann hevur áður sum landsstýrismaður víst síni evni at leiða undir sera truplum umstøðum. Hann hevur sostatt evnini og má sostatt eisini sýna viljan.

**Sosialurin**

## Alt kostar pengar

HJALMAR N. POULSEN



At halda eitt tíðarhóskandi sjúkrahúsverk koyrandi er onki undantak í so máta. Serliga tá myrkursins gerðir í fíggjarligum høpi, sum ormar úr deyðseyðakrovi, stinga seg upp í umsitingini, kann tað kosta nógv, øðiliga nógv. Men allar súðir eru enn ikki syftar.

At noyðast uttanlands eftir serfrøði á læknavísunda økinum er heldur ikki ókeypis. Vikarar sum eru starvssettir upp á deiltíð fyri ávíst fast avgjald, har frástøðutillegg og onnur avgjøld gera rokningina dýra, ávirkar heildarútreiðslurnar í stóran mun. At júst hetta skapar ótrivnað millum tey, sum annars eru fast knýtt at ávísu deildunum á einum sjúkrahúsi, er onki at siga til. Júst hetta hevur ein óynsktan ójavnað við sær, sum als ikki betrar um eina sunna trivnaðarstøðu. Heldur tvørtur ímóti.

At skúgva viðurkendar og ábyrgdafullar læknar burturúr ynskistarvi sínum, er heldur ikki ókeypis. Slíkt er burtur úr vón og viti, serstakliga tá talan er um umsitingarligt fusk í leiðslunnar trappustiga. At sakin hjá viðkomandi, ongantíð fekk mannsømiliga viðgerð, man hava sína grund.

Í føroyska landsfíggjarlógaruppskotinum 2008 stóð sjúkrahúsverkið annars til at mangla umleið 30 milliónir krónir til "heilivág" og "lønir", men fekk onki. Spurningurin er so, hví so var.

Hetta er ein góður spurningur, sum krevur eitt holdbart svar.

Sjúkrahúsverkinum tørvar sum kunnugt einar 30 mill. krónur. Lítil fuglur sang fyri mær, at í 30 milliónа upphæddini er ein postur, sum er eitt sjeysiffrað krónuvirði, fyri at tænastumannakanningin, sum eftir áhaldandi umbøn bleiv noktað ávísum persóni, ístaðin bleiv "keypt" burtur úr systeminum? Er tað veruliga so galið, at okkara skattapengar vera brúktir, sum heftiplástur á sárið, sum ódugnaskapur í umsitingini er atvoldin til?

Hesir purningarnir eru settir til avvarðandi myndugleika at svara.

Og enn eru ikki allar súðir syftar.

## Latið Klaksvíkar Sjúkrahús hava frið!

ASBJØRN LÓMAKLETT

Endaleysu álopini: Við jøvnum millumbilum kanst tú lesa, at nú skal skil fáast í føroyska sjúkrahúsverkinum, og loysnin skal vera at leggja niður Klaksvíkar Sjúkrahús.

Sjávur løgmaður er somuleiðis endurgivin fyri sama afturvendandi møsnið.

Tað løgna við hesum er kortini, at eitt sjúkrahús, ið virkar sera væl, og har tú fært nógv fyri ílagda pengingin, skal víkja fyri Landssjúkrahúsinum, ið als ikki virkar eftir ætlan, men sum er kent fyri ósemjur, klandur og grov mistøk mótvegis sjúklingum sambært Dimmalætting m. a.

Virksemið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er munandi økt, síðani Norðoyabergholið lat upp. Sum skilst, so er skúkrahúsið vorðið tænastumiðdepil fyri nærumhvørvið í Eysturoy umframt Norðoyggjar. Hetta er hent uttan nevniverdan útreiðsluvøkstur, og øll eru sera væl nøgd við tænastuna, ið veitt verður.

Tað hoyrist somuleiðis, at góðar kreftir á báðum sjúkrahúsunum eru samdar um at samstarva á øllum økjum, har tað á nakran hátt er møguligt.

Hetta samstarv ljóðar spennandi og er samstundis ein góð avbjóðing fyri starvsfólkini, ið talan verður um.

**Starvsfólkini gíslar:**
Starvsfólkini á Kl. Sjh. mugu liva við støðugari hóttan um, at arbeiðspláss teirra fara at hvørva um skamma stund, tá sjúkrahúsið kortini fer at verða minkað til eina fyribils skaðastovu.

Hetta er starvsfólkapolitikkur, tá hann er vánaligastur. Tað má av sonnum sigast.

Nei, latið hesi fólkini fáa frið at gera tað dygdararbeiði, ið tey eru sera kend fyri um alt landið.

**Milliónaslúkurin:**
Landssjúkrahúsið tykist vera botnleyst hol við einum útreiðsluvøkstri, ið liggur um 10% árliga. Eitt er vist, at hóast tú koyrir tær 40 mill. kr., ið Kl. Sjh. kostar at reka um árið í Landssjúkrahúsið, so hevði hetta tó ikki tálmað útreiðsluvøkstrinum á LS.

Skilið hevði verið tað sama um stutta tíð: Ov lág játtan, ov ringar umstøður.

**Dugnalig starvsfólk á LS:**
Meginparturin av teimum, ið starvast á LS, eru uttan iva bæði dugnalig og ágrýtin til verk sítt, men har má okkurt vera heilt galið við skipanini, síðani ikki fæst skil á fíggjarviðurskiftunum og samstarvinum.

Tí er tað beint av samgonguni at kanna hetta sera fløkta og stóra mál, áðrenn tey fara at oysa tíggjutals milliónir í raksturin av nýggjum uttan at vita, um nakað fæst fyri peningin.

**Beint at varðveita Kl. Sjh.:**
Hóast tað skuldi eydnast at fáa skil á LS, so er tað kortini rætt at varðveita Kl. Sjh. í tøttum samstarvi við LS, sum eisini er ynski frá sjúkrahúsinum her.

Vit fáa samstundis eitt sindur av kapping, so tað er altíð til bata fyri avrikini.

Politikarar, ið ætla at bøta um sjúkrahúsverkið, eiga at fara at "grava", har ið trupulleikarnir veruliga eru, og tað er ikki á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Nei, latið Klaksvíkar Sjúkrahús fáa frið.

### Umbering til Norðuratlantsbólkin

Í Sosialinum 23. mai var grein í eini temarøð um útisetar, nevnd "Ongar ætlanir um at flyta til Føroya". Í greinini koma nakrar óhepnar útsagnir um kanningina hjá Norðuratlantsbólkinum við beinleiðis tilsiping til Hitler og nazismu. Hetta átti ikki at komið á prent, og fara vit við hesum at biða Norðuratlantsbólkin umbera okkum, at hetta ikki varð rættað, áðrenn greinin kom í blaðið.

***Blaðstjórnin***

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.